# Fara at kanna ferðslutrygdina

**Landsverkfrøðinguri n fer at kanna, um vegsamsnkomingin í Líðini í Kollafirði er nóg trygg, ella um ábøtur skulu gerast. Fleiri óhapp og ein deyðsvanlukka eru hend á staðnum**

FERÐSLUTRYGD
*Edvard Joensen*

**Kollafirði:** Landsverkfrøðingurin fer at kanna eftir, um vegsamakomingin, har bygdarvegurin kemur inn á landsvegin inni í Líðini í Kollafirði, er nóg trygg.

Fólk hava vent sær til landsverkfrøðingin og gjørt vart við, at tey halda ikki, at vegastrekkið í Líðini og inn á Langasand er nóg trygt sum er. Skeltingin kundi verið betri, halda tey, og sjálvur vinkulin, har bygdarvegurin kemur inn á landsvegin, kundi kanska eisini verið øðrvísi, verður víst á.

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur, sigur, at allar slikar áheitanir á Landsverkfrøðingsstovnin verða kannaðar, og vísir tað seg, at talan kann vera um kravdar ábøtur, verða tær gjørdar.

Kollfirðingar, sum hava gjørt vart við støðuna, vísa á, at á hesum staðnum eru í hvussu er trý óhapp og ein vanlukka, sum kravdi mannalív, hend. Í trimum førum, sigur kelda okkara, stoyttu bilar saman, og í hvussu er einaferð, varð eitt barn ákoyrt, tá tað fór av bussinum, sum steðgaði við buss-steðgiplássið, sum er beint við vegsamankomingina.

Tað, at buss-steðgistað er beint við smankomingina, hevur landsverkfrøðingurin merkt sær, og sigur Oyvindur Brimnes, at tað verður ikki hildið vera nóg trygt. Tí er eisini gjørt av at gera eitt nýtt steðgipláss inni á Langasandi, við vegamótið til Oyrareingir og Signabøar. Steðgiplássið úti í Líðini verður so niðurlagt, sigur hann.

Fólk hava gjørt vart við, at skeltingin við landsvegin í Líðini er ikki nóg góð. Serliga er tað norðaneftir, bilarnir koyra skjótt, og teir síggja ikki skelti, sum sigur frá bygdum øki, fyrr enn teir mestsum eru á kroppinum á ti, siga kollfirðingar.

Skeltið, sum vísir, at komið verður í bygt øki, stendur í einum vegbugi, og er so mikið innalaga, at tað er áraka bygdarvegin, har hesin kemur í landsvegin. Á sama stað eru eisini skeltini til bussin.

Ført verður fram, at tað átti at verið umhugsað at sett eitthvørt skelti upp longri norðuri í Líðini, sum sigur frá, at her kemur ein bygdarvegur út. Og í øðrum lagi at flutt skeltið, sum sigur frá, at komið verður í bygt øki, longur norður.

Til tað sigur Oyvindur Brimnes, at ikki er vanligt hjá okkum at hava skelti, sum ávara um, at nú kemur ein til ein bygdarveg, sum liggur út í landsvegin. Tað er júst skelti, sum sigur frá bygdum øki, sum skal ávara um tað. Og greiðar reglur eru fyri, hvussu langt eitt slíkt skelti skal standa frá staðnum, har bygdarvegurin ella bygda økið byrjar.

Í hesum førinum inni á Langasandi innan fyri Líðina, byrjar bygda økið við eina upptrekta linju, og haðani verður so mált, hvar skeltið skal standa. Tað er so grundin til, at tað stendur júst har, tað er, sigur hann.

Øll slík mál verða annars viðgjørd í Landsferðslunevndini, sum fær viðmerkingar og kærur til viðgerðar, sigur Oyvindur Brimnes.



*Kollfirðingar kæra um, at vegamóti í Líðini er ov ótrygt. Fleiri óhapp og vanlukkur eru hend á staðnum, og skeltingin átti at verið betri, halda teir. Lands-verkfrøðingurin lovar at kanna trygdina á staðnum og hyggja at, hvat gerast kann. Bussteðgiplássini verða flutt, sigur hann*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Onkur hevur tikið avleiðingarnar og ávarar sera harðliga um støðuna á staðnum*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Gamla brúgvin flutt



*Arbeiðsbrúgvin um Leynará er tikin niður og flutt norður til landsfjósið, har hon verður goymd*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Arbeiðsbrúgvin, sum løgd varð um Leynará í samband við ger av undirsjóvartunlinum, er tikin niður og goymd burtur**

AVRIGGING
*Edvard Joensen*

**Leynar:** Tað sæst alt minni til, at tað nakrantíð hevur verið arbeitt við undirsjóvartunli í Leynum. Brúgvin, sum koyrt varð eftir, meðan arbeitt varð, er nú eisini burtur.

Gamla arbeiðsbrúgvin er tikin niður. Landsverkføðingurin eigur brúnna og hevur havt hana lýsta til sølu. Men eingin legði í at keypa, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur.

Men brúgvin skuldi takast burtur, og tað varð hon so. Løgd á ein stóran blokkvogn og flutt norður um Kollafjørð til Landsfjósið at liggja, til funnið verður fram til, hvat hon kann brúkast til.

– Brúgvin er fín, sigur Oyvindur Brumnes. Breið og sterk, og kann saktans nýtast í samband við vegagerð onkunstaðni.

Okkurt er, sum bendir á, at hon kemur aftur til heiður og æru.

# Hýasint seld til Kroatia

**Trolarin Hýasint er seldur til Kroatia. Hýasint, sum er gamli Smaragd, er tikin úr flotanum, og veiðiloyvið flutt øðrum skipi**

SKIPASØLA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Partafelagið Vesturvón hevur selt trolaran Hýasint til Kroatia. Fólk er komið eftir skipinum.

Hýasint er gamli Smaragd, sum partrolaði við Brillant, sum var av sama slagi. Skipini eru bygd í Eysturtýskalandi í sekstiárunum.

Smaragd varð lagdur, tá táverandi eigararnir keyptu annað skip og góvu tí sama navnið. Gamli Smaragd fekk tá navnið Hýasint.

Partafelagið Vesturvón keypti so skipið og flutti veiðiloyvið til annað trolparið, felagið frammanundan hevði, og Hýasint varð síðan løgd.



*Hýasint, sum eina tíð hevur ligið við bryggju í Miðvági, fer nú niður á sólríka Adriatarhavið at fiska undir kroatiskum flaggi. Fínt skal tað vera*

*Mynd: Edvard Joensen*

Skipið hevur staðið á sølulista, og nú er tað selt til Kroatia, sigur Ólavur Petersen, reiðari á Vesturvón.

Hvat skipið skal brúkast til í Kroatia, veit han ikki, men metir kortini, at tað verður til fiskiskap. Fólk er komið til skipið, og onkur fer at koma afturat, so farið verður fyrsta dagin, sigur hann. Hann vil ikki siga, hvusu nógv Hýasint er seld fyri.



# Verða vit ikki við, enda vit uttanfyri

**Jógvan Mørkøre, sum áður hevur verið ivasamur um samanlegging, heldur, at tíðin nú er komin, har fólkið í kommununum, sum eru við í kommunufelagsskapinum í Sundalagnum, sleppur at taka støðu. - Eg vænti ikki, at samstarvið, sum Hósvíkar kommuna hevur við bygdirnar í Sundalagnum, fer at halda fram sum higartil, um vit velja at standa uttanfyri, sigur hann**

ATKVØÐUGREIÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

Í gjár høvdu fólk í tilsamans seks kommunum í norðara parti av Streymoy og Eysturoy høvi at atkvøða um samanlegging.

Ein sameiningarbólkur við tveimum umboðum úr Haldórsvíkar kommunu, Hvalvíkar kommunu, Saksunar kommunu, Hósvíkar kommunu, Sunda kommunu og Gjáar kommunu hevur seinastu mánaðirnar arbeitt við ymiskum málum og hevur gjørt nakrar niðurstøður.

Í prinsippinum skuldi bólkurin ikki neyðturviliga arbeiða við at skipa eina fólkaatkvøðu um samanlegging, men úrslitið, sum at enda spurdist burtur úr hesum arbeiði, var ein fólkaatkvøða.

## Ja ella nei

Á atkvøðuseðlinum eru møguleikarnir tvinnir – ja ella nei fyri samanlegging av hesum seks kommununum.

Atkvøðugreiðslan fór fram á vanligu valstøðunum í nevndu kommunum, og valstøðini vóru opin frá kl. 10-14 og 16-20 í gjár.

Sosialurin fór til prentingar tíðliga seinnapartin í gjár, so vit høvdu ongan møguleika at hava úrslitið við í hesum blaðnum.

Í gjáramorgunin fóru vit kortini fram við í Hósvík ein túr. Har hittu vit bygdarráðsformannin, Jógvan Mørkøre, sum nú situr triðja skeiðið í bygdarráðnum og sum formaður á øðrum skeiði.

Jógvan hevur ikki sitið í sameiningarbólkinum fyri Hósvíkar kommunu, tí tá ið bólkurin varð skipaður, helt hann seg ikki hava stundir til tess. Umboðini hjá kommununi í bólkinum hava verið Jákup Klein Olsen og Jónhild Hermansen.

## Samstarv

Jógvan vísir á, at í kommunufelagsskapinum í Sundalagnum samstarva bygdirnar á fleiri økjum.



*Her atkvøður bygdarráðsformaðurin í Hósvík, Jógvan Mørkøre, ja til samanlegging*

*Mynd: Jens Chr. Vang*

- Vit fingu ferð eftir ferð skriv frá landsstýrinum um at tosa saman og um at taka støðu til samanlegging – fyrst frá Signari á Brúnni, síðan frá Eilifi Samuelsen. Vit valdu tó at halda fram við at samstarva heldur enn at leggja saman.

Hóast hann hevur veirð ivasamur um samanlegging av kommununum, heldur Jógvan nú, at tíðin er komin, har hetta stigið eigur at verða tikið - »áðrenn aðrir taka tað fyri okkum«, sum hann tekur til.

Jógvan sigur, at kommunufelagsskapurin í Sundalagnum hevur somu umhvørvisnevnd, har hann sjálvur er formaður. Síðan eru kommunurnar felags um eitt nú brunanevnd, tannlæknaskipan, ellis- og røktarheim í Streymnesi og Felagsskúlan á Oyrarbakka, har Eiði eisini er við.

- Í hølunum á Oyrarbakka, har umsitingin av hesum felagsmálum er, hava vit eisini læknahøli, heilsusjúkrasystir og heimahjálpina.

Í føstum starvi sum skrivari hjá kommunufelagsskapinum, er Jens Marius Dalsgaard, sum áður hevur verið skrivari í Føroya Kommunufelag. Sum formaður í umhvørvisnevndini, er Jógvan Mørkøre í hálvtíðarstarvi við fleksiblari tíð.

Kommunufelagsskapurin hevur sína egnu fíggjarætlan.

## Atkvøður ja

Jógvan vísir á, at hóast eingin atkvøðugreiðsla hevur verið í bygdarráðnum um samanlegging, metir hann, at tríggir av fimm bygdarráðslimum eru fyri, meðan tveir, har millum hann sjálvur, hava verið í iva.

- Men í dag eri eg ikki í iva, og tí havi eg greitt atkvøðu fyri samanlegging, sigur hann.

Jógvan sigur, at sum formaður í umhvørvisnevndini við ábyrgd av hesum málum – eisini í øðrum bygdum enn Hósvík, ivast hann í, hvussu demokratiskt ein slík skipan er, tí sum hann sjálvur sigur, so er hann fólkavaldur í Hósvík, men ikki í hinum bygdunum í kommunufelagsskapinum.

Hann er annars ikki samdur við teimum, sum siga, at umsitingin er dýrari við tí samstarvi, sum er.

- Eg haldi, at fólk hugsa ov lítið um, hvussu stórur partur barnaansingin og skúlin eru vorðin av fíggjarætlanini hjá kommununum, sigur Jógvan.

## Við ella uttanfyri

Bygdarráðsformaðurin í Hósvík væntar, at Hósvíkar kommuna við tíðini fellir uttanfyri verandi samstarv, sum er millum kommunurnar í Sundalagnum, um fólkið velir ikki at fara uppí, nú høvið er til tess.

- Velja vit at standa uttanfyri, vænti eg, at vit verða ótrúliga uttarliga, tá ið samanum kemur, sigur Jógvan Mørkøre, bygdarráðsformaður í Hósvík.



*- Summi hava stóran áhuga fyri atkvøðugreiðsluni, meðan onnur eru meira avslappað, sigur Jógvan Mørkøre*

*Mynd: Jens Chr. Vang*

# Meira tilfar kemur um Fish Fair

EFTIR FISH FAIR
*Vilmund Jacobsen*

Sosialurin fer at hava meira tilfar frá altjóða fiskivinnu- og alistevnuni, North Atlantic Fish Fair, sum varð hildin á havnalagnum í Saltangará týsdagin, mikudagin og hósdagin í síðstu viku.

Ein av greinunum, sum eftir er, fer at snúgva seg um maskinverkstaðin, Normek í Gøtu, ein onnur um felags básin hjá Bátafelagnum á Bakka og Forna á Glyvrum og ein triðja um básin hjá Statoil.



*Sosialurin fer at hava nakrar greinar aftrat um altjóða fiskivinnu- og alistevnuna, North Atlantic Fish Fair*

## Áhugavert projekt

Sosialurin fer eisini at tosa við fyritøkuna, Marel í Íslandi, sum hevði bás saman við formula.fo.

Samrøðan við næst ovasta mannin hjá Marel er ógvuliga áhugaverd, tí her greiðir hesin frá eini serstakari uppgávu, sum fyritøkan hevur fingið í Lofoten.

Marel fekk nevniliga til uppgávu at framleiða eina maskinu til tosk og hýsu, sum »nappar« beinini úr fiskaflakinum.

Hendan maskinan verður nú royndarkoyrd, og úrslitini eru ógvuliga áhugaverd.

Orsøkin til uppgávuna úr Lofoten er, at kinverjar við síni bíligu arbeiðsmegi rættiliga hava tikið kappingina upp við fiskaframleiðarar í eitt nú Noregi.

Neyðugt er tí at gera framleiðsluna bíligari á tann hátt, at færri fólk eru um uppgávurnar.

## Størri úrtøka

Í staðin fyri, at fleiri fólk standa og kílaskera, er ætlanin við nýggju maskinuni, at beinini skulu »nappast« úr flakinum.

Úrtøkan í fiskinum er eisini størri, tá ið kílin situr eftir í flakinum – við ongum beinum.